ítróttur

Toftamenn eru omaná

1. deild, menn:
B36-B68 2-3 (1-2)

B68 verður eisini komandi ár í bestu deildini. Tí syrgdu teir sjálvir fyri at staðfesta fýra umfør undan kappingarenda, tá teir vunnu móti B36 í Gundadali. B68 hevði ikki skorað móti B36 í Gundadali síðani 1990, og teir høvdu ikki vunnið har síðani 1984.

Men slíkt legði nýskipaða toftaliðið lítið í. Á liðnum vóru fimm veteranar og superveteranar, og saman við teimum vóru sjey ungir leikarar, sum hava leikt á besta liðnum frá nøkrum fáum árum og til nakrar fáar dystir.

Tað var ein av hinum gomlu, álopsleikarin Aksel Højgaard, sum fekk hol á, um miðjan 1. hálvleik. Tíggju minuttir seinni javnaði ein av yngstu monnunum á vøllinum, Gunnar Nielsen, sum skoraði fyri fyrstu ferð – men neyvan fyri síðstu ferð! – á besta B36 liðnum. Sum rættur framherji tók hann av, tá B68 verjan dráladi við at fáa bóltin burtur úr brotsteiginum.

Tað gekk javnt á, kanska hevði B36 fleiri málmøguleikar, men stutt undan hvíldini kom B68 aftur á odda: Frísparksvariantur uttan fyri brotsteigin tykist miseydnast, men Jákup Djurhuus fær stutt úr málinum í besta Ole Madsen stíl sett hælin á, og so var mál.

Málverjumistak

B68 noyddist at umskipa liðið 2. hálvleik. Edmund Jacobsen fór út úr miðverjuni, og ein av ungu monnunum, Arnbjørn Danielsen, kom inn. Hann hevur ikki nógvar royndir á tí plássinum á besta liðnum, men bóltførleikin er í lagi, og fyri B68 spældi tað væl av.

B36 var ágangandi allan 2. hálvleik, men toftamenn hildu høvdið kalt, og hóast kroystir við hvørt, og hóast B36 bæði rakti tvørtræ og uppstandara, so fóru bæði stigini inn á Toftir. Gott at tað ikki var millum útvarpsmannin og mannin í búrinum, at dysturin varð avgjørdur, helt toftamaður fyri eftir dystin!

B36 javnaði miðskeiðis í 2. hálvleiki. Gunnar Nielsen syrgdi fyri skotinum, sum fór dygst við stólpan uttan møguleika hjá Kjartani Nesá.

Sigursmálið kom góðar fimm minuttir seinni. Aftur var tað Aksel Højgaard, sum var á rætta staðnum, røttu løtuna. Egin Høgnesen, sum undan summarsteðginum var sannur brandur í B68 málinum, hjálpti ikki so lítið til. Í staðin fyri at halda ella boksa burtur, valdi hann eina vánaliga millumloysn, og Aksel takkaði fyri tilboðið.

Spruttaðu eina løtu

Um miðjan 2. hálvleik setti B36 Hera Olsen inn í roynd at vinna dystin. Hann var vandamikil, men tá B68 setti Súna Fríða Johannesen aftur at ansa honum, fekk Heri ikki gjørt so nógv.

Súni Fríði Johannesen var annars ein teirra, sum stríddist nógv. Tummas Eli Hansen ansaði B68 liðformanninum, áðrenn hesin fór í miðverjuna, men tað kom hann ikki serliga væl frá.

Fleiri mál komu ikki, men B36 viðhaldsfólkini vóru ikki blíð við dómaran eftir dystin. Hann hevði kolldømt mál, sum Edvard Apalkov skoraði upp á frískpark. Dómarin hevði ikki bríkslað, og tí skuldi skotið takast um aftur, og tá kom einki burturúr.

(-nn-)



Tummas Eli Hansen, B36 í lufiduell við Arnbjørn Danielsen og Ingemar Højgaard, B68, í dystinum í Gundadali sunnudagin
Mynd: Niels J. Heinesen

Lítil munur á toppi og botni

2. deild, menn:
NSÍ-LÍF 0-1 (0-1)

Leirvíkingar vóru saman við trúføstu áskoðarunum í Runavíkini leygardagin. Við at kveita at støðutalvuni skuldi verði lætt at mett um úrslitið. NSÍ var undan dystinum niðast, meðan LÍF var á triðja plássi. LÍF hevði vunnið seks teir seinastu dystirnar, meðan NSÍ hevði tapt teir báðar seinastu dystirnar móti teimum báðum oddaliðunum við til saman 18-0.

Men tað sást ikki á spælbýtinum, at tað vóru toppur og botnur, sum dystaðust. Á liðnum hjá NSÍ vóru fimm unglingar og elsti maður var 25 ár. Teir vóru ágrýtnir og bitu frá sær.

At teir ikki fingu annað stigið kunnu teir í stóran mun takka sær sjálvum fyri. Teir vóru væl við alla tíðina, nógv av spælinum gekk fyri seg á LÍF hálvuni, men NSÍ hevði ikki nógvar málmøguleikar.

Einar tríggjar ferðir vóru teir tætt við at skora. Besta møguleikan fekk Regin Frederiksberg korter undan leikloki. Stutt eftir at hann var komin inn í álopið, fekk hann møguleika at lyfta upp um Torfinn Hansen, sum leyp langt út úr málinum, men bólturin dalaði niður í nettakið.

LÍF fekk málið, tá knappur hálvur tími var farin. Eftir frískpark úr høgru fekk Gert Langgaard dygst undir málinum bóltin niður á lærið, haðani hann støkk inn um strikuna.

Leirvíkingar megnaðu ikki at niðurspæla botnliðið. Teir fingu ongantíð leikferðina upp. Tað er lítið av ungum fólki í Leirvík, og tí eru fleiri veteranar á liðnum, sum ikki eru í tí venjingarstøðu, sum skal til. LÍF flytir ikki upp, og tað skulu teir ikki iðra seg um.

Bestir hesa ferð vóru miðverjarnir Signar á Reynatrøð og Hans Fróði Hansen, sum høvdu staðið seg í bestu deildini saman við John og Hjørleif Olsen. Tað hevði Gert Langgaard eisini, um alt var, sum tað eigur at vera, men hann [illegible] darvið [illegible] leikar.

Kristian á [illegible] var við fyri fyrstu ferð í ár. Ætlanin var, at hann skuldi spæla við sandoyingum, men skaði hevur hildið honum burtur, og nú er hann farin aftur í sítt gamla felag.

-nn-

Gøtumenn høvdu møtt Blackburn

Tað er alhíð lætt at vera [illegible] at tað, men kontini [illegible] er [illegible] við- [illegible]

[illegible] tvíroknu gátuna um, hvussu tey ymisku liðini í europeisku liðkappingunum koma at spæla í næsta umfarinum, og sambært tí, kundi saktans onkur stak áhugaverdur dystur komið at verið spældur á Svangaskarði í næsta mánaði, um okkurt av førdu ikki [illegible] Hugsað verður [illegible] fremst um GI, [illegible] frægasta úrslitið [illegible] menn taptu tepurt fyrra dystin við einum máli, og seinna dystin áttu teir at havt vunnið, tá sviarnir úr Trelleborg gjørdust níggju móti ellivu á vøllinum í seinna dystinum, ið endaði við teprum svenskum sigri: 3-2.

Vann GI hann dystin, var [illegible] móts[illegible]liðið [illegible] [illegible] Blackburn úr [illegible] Oivað hevði [illegible] ein «publikumsdystur»...

Móts[illegible]liðið hjá HB, skotska Motherwell, fær vitjan av Borussia Dortmund úr Týsklandi, og finska liðið HJK Helsinki, ið vann á B71, skal spæla móti einum turkiskum liði í næsta umfarinum.